# Stórur áhugi fyri jólakapping




*Gudny og Durita fegnast um undirtøkuna, jólakappingin fær*

**Tað eru nógv fólk, sum liggja fram við at vinna vinningarnar í stóru jólakappingini hjá Sosialinum**

Ídesember mánað skipaði Sosialurin fyri jólakapping í blaðnum. Puntar vóru í hvørjum blaði í desember, og teir skuldu klippast og límast á ein jólakalendara, sum Óli P. hevði teknað, og sum varð borin í hvørt hús í landinum síðst í november.

Tað eru sera nógv fólk, sum hava tikið lut í kappingini og nú eru um boðið at vinna teir frálíku vinningarnar.

Sosialurin fekk óvanliga nógvan post í morgun, og higartil eru komnir 2.500 kalendarar inn til kappingina. Enn ber til at verða við í kappingini, tí seinasta freist at senda kalendarar inn er tann 8. januar 2007.

Treytin fyri at verða við í kappingini er, at tú hevur savnað allar puntarnar úr blaðnum og hevur límað teir á kalendaran.

Høvuðsvinningurin í kappingini er ein ferð, har tú kanst bjóða 17 vinum til Lalandia við Atlantsflogi. Olja frá Shell fyri 10.000 krónur kann eisini vinnast, og 10 kassar av Faxe Kondi frá Poul Michelsen Heilsølu standa eisini upp á spæl.




Vika 1, 2007

# 2006 gott partabrævaár

**MARKNAÐARRÁK**

Hesar báðar vikurnar síðan seinasta marknaðarrák hava verið merktar av, at lítið hevur verið handlað á virðisbrævamarknaðunum. Hetta er vanligt við ársenda. 2006 gjørdist eitt gott partabrævaár, serliga á evropisku marknaðunum. Norðurlendsk partabrøv hækkaðu í miðal 19% og evropisk hækkaðu 20%. Amerikonsk partabrøv hækkaðu 16% roknað í dollara, men fyri ein evropiskan íleggjara var hetta tó einki serligt. Hetta kemst av, at dollarin viknaði nógv sum árið leið, og mátað í evrum góvu amerikonsk partabrøv bert stívliga 4% í vinningi. Útlit eru fyri, at 2007 verður eitt miðalgott partabrævaár, hóast vinningurin neyvan verður eins góður og í farna ári.

## Lánsbrævarentur farnar at hækka

2006 endaði við hækkandi lánsbrævarentum. Danska 10-ára rentan er nú 3,93%, og í desember hækkaði hon 0,20%-stig. Seinasta árið er 10-ára rentan hækkað 0,65%-stig. Útlit eru fyri, at hon fer at hækka meira komandi vikurnar.

## Hækkandi inntøkur stuðlaðu partabrøvum

Sum nevnt omanfyri gjørdist 2006 eitt gott ár á flestu partabrævamarknaðunum. Serliga á okkara leiðum var vinningurin góður. Til dømis hækkaði Danmark 14%, Svøríki 23% og Noreg heili 34%. Harafturímóti var Fjareystur meiri blandað. Hong Kong hækkaði 35%, meðan Japan bert hækkaði 7%, og Thailand lækkaði 5%, alt í lokalum gjaldoyra. Aftur í 2006 vóru hækkandi partabrøvini stuðlað av hækkandi inntøkum hjá virkjunum. Roknskapirnir fyri 3. ársfjórðing vístu millum annað, at inntøkurnar í USA vóru 23% hægri enn árið fyri.

## Hesa vikuna

Ársins fyrsta vika verður hendingarík. Vit leggja hart út við álitistølum, tjóðbankauppriti og arbeiðsmarknaðarfrágreiðing úr USA. Harumframt kemur eisini prísvøkstur úr Evropa. Eftir at lítið hevur verið handlað í desember, verður áhugavert at fáa meiri handil á marknaðunum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 565,01 | -0,7% |
| JPY | 4,75 | -1,5% |
| GBP | 1.106,53 | -0,2% |
| NOK | 90,56 | -0,9% |
| SEK | 82,48 | 0,1% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,18 | -0,4% |
| Norrøn Partabrøv | 127,00 | 1,7% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 552,00 | 0,2% |
| KB Trygg Eurostoxx | 107,64 | -0,2% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*